RÁÐGEVARAFELAGIÐ

Veturin 2018 / 2019

# FØROYSK RÁÐGEVING

Arkitektar | Verkfrøðingar | Byggifrøðingar



## Umhugsni krevst í upphitaðum búskapi

## Bústaðarneyð kann elva til lappaloysnir

## Býráðshúsið er brúgv millum bygdir

## Trygdarsamskipan altumráðandi á byggiplássum

**Útgevari**
Ráðgevarafelagið
Óðinshædd 7
FO-100 Tórshavn
industry@industry.fo

**Skrivað**
Uni Arge
uniarge@gmail.com

**Layout**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

**Prent**
Føroyaprent
www.foroyaprent.fo
info@foroyaprent.fo

**Kápumynd**
Býráðshúsið í
Eysturkommunu

**Upplag**
1.000 eintøk

## Føroysk ráðgeving

Hetta blaðið hevur Ráðgevarafelagið latið gera, sum er felagið hjá arkitektafyritøkum, verkfrøðingafyritøkum og byggifrøðifyritøkum í Føroyum. Endamálið hjá felagnum er at savna allar ráðgevandi fyritøkur við heimstaði í Føroyum, serliga í byggivinnuni, at útinna felags áhugamál.

Endamálið er eisini at styðja upp undir samskifti og førleikamenning millum limafeløgini og virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu í málum, sum viðkoma ráðgevaravinnuni. Felagið varð stovnað í 2008 og heldur til í Vinnuhúsinum.

Føroysk ráðgevaravinna er nógv ment seinastu áratíggjuni, og avrikini hjá føroyskum ráðgevar-um eru mong og fjølbroytt, eins og sæst í blaðnum. Áhaldandi minnir Ráðgevarafelagið á, at føroyskar ráðgevarar skulu hava líka góðar møguleikar at bjóða upp á verkætlanir sum útlendskar fyritøkur.







**4** Umhugsni krevst í upphitaðum búskapi

**8** Bústaðarneyð kann elva til lappaloysnir

**14** Býráðshúsið er brúgv millum bygdir

**18** Trygdarsamskipan altumráðandi

**24** Gongur væl at útbyggja Landssjúkrahúsið

**30** Nú koma hotellini

**36** Mest at gera fyri kommunurnar

**38** The Faroe Islands can be Self-Sufficient with Consultancy Services

**40** Limirnir í Ráðgevarafelagnum




LBF









# Umhugsni krevst
## í upphitaðum búskapi



**Nógv trýst er á politikarar í løtuni at loysa alskyns avbjóðingar. Trýstið kann hava við sær, at fleiri skeivar avgerðir verða tiknar, og tí krevst, at allar góðar kreftir seta seg saman at umhugsa, hvussu samfelagið skal byggjast út, sigur Selmar Nielsen, formaður í Ráðgevarafelagnum**

Fleiri stúrsaðu við, tá stjórin á Føroya Tele, Jan Ziskasen, herfyri spáddi, at í 2025 verða 60.000 fólk í Føroyum, og at 35.000 fólk fara at búgva í høvuðsstaðnum. Nøkur vístu framskrivingini aftur, tí tey hildu ikki, at fólkavøksturin verður so stórur, men útsøgnin varpaði ljós á eina avbjóðing, sum longu er veruleiki.

Trýstið á politikarar um at byggja samfelagið út hevur leingi verið stórt. Bústaðir vanta, barnaansingin er ikki nøktandi, fleiri tunlar krevjast, hotell verða bygd, havnir verða útbygdar, sjúkrahúsverkið mennist, og íløgurnar í skúlar hava verið risastórar farnu árini.

Hetta hendir, meðan 51.000 fólk búgva í Føroyum, harav 22.000 eru búsett í høvuðsstaðnum.

”Hvussu verður, tá vit eru vorðin 60.000 ella kanska bara 55.000 fólk í Føroyum,” spyr Selmar Nielsen, formaður í Ráðgevarafelagnum.

## Skynsama menning

Sum formaður í felagnum hjá arkitektum, verkfrøðingum og byggifrøðingum undirstrikar hann, at hann fegnast um, at væl gongst í samfelagnum. Men hann hevur eisini síni fyrivarnir.

”Vaksandi fólkatal elvir til stórt trýst á løgting og kommunustýrir. Nógvir tørvir skulu nøktast, og á t.d. bústaðarøkinum megna vit ikki at fylgja við. Tí verða í summum førum framdar loysnir, ið ikki bera brá av góðsku. Vit hoyra eisini um vantandi barnaansing, og at tey eldru verða støðugt fleiri og krevja fleiri stovnspláss. Hesar avbjóðingar mugu vit hava í huga longu nú,” sigur hann.

Hann væntar, at tørvur verður á fleiri nýbyggingum, nú fólkatalið áhaldandi veksur, men mælir til, at tær verða framdar við umhugsni.



*Selmar Nielsen, formaður í Ráðgevarafelagnum*

”Skulu nógvir nýggir bústaðir, ansingarstovnar og eldrabústaðir byggjast, er neyðugt at fremja útbyggingarnar á skynsamasta hátt. Í Ráðgevarafelagnum ivast vit ikki í, at føroyskir ráðgevarar eru best førir fyri at fyrireika tílík arbeiðir. Okkara vinna hevur meira enn 50 ára royndir at byggja landið út. Vit vita, hvat krevst at fyrireika verkætlanir til eitt oyggjaland, har lágtrýstini og hátrýstini møtast og skapa eitt avbjóðandi veðurlag,” sigur Selmar Nielsen.

## Færri stórar verkætlanir

Ráðgevaravinnan hevur havt nógv at gera farnu árini. Jú fleiri brúka føroyskar ráðgevaratænastur, jú betri verða fortreytirnar fyri, at vinnan kann mennast. Selmar Nielsen vónar, at vinnan kann halda fram at menna seg, men sær ymisk tekin í sól og mána um, at færri stórar verkætlanir eru beint fyri framman.

”Nógvar stórar verkætlanir eru í gongd í løtuni. Havnarlagið í Havn verður útbygt, sjúkrahúsverkið byggir út, undirsjóvartunlarnir eru í gongd, depilin í Marknagili er tikin í nýtslu, Skúlin á Fløtum er í gerð, Bakkafrost byggir smoltstøðir, og SEV byggir út. Sum ráðgevarar eru vit við í fyrireikandi arbeiðinum, so hesi arbeiðini eru mestsum farin afturum. Hyggja vit nøkur ár fram, verða ikki líka nógvar stórar verkætlanir at fremja,” sigur Selmar Nielsen.



**SKULU NÓGVIR NÝGGIR BÚSTAÐIR, ANSINGARSTOVNAR OG ELDRABÚSTAÐIR BYGGJAST, ER NEYÐUGT AT FREMJA ÚTBYGGINGARNAR Á SKYNSAMASTA HÁTT**

## Granska í framtíðini

Trýstið á politikararnar á tingi og í kommunustýrum átti at fingið myndugleikarnar at umhugsa, hvagar Føroyar fara í løtuni, heldur hann.

"Ein ávísur fjáltur er á politisku skipanini á t.d. bústaðarøkinum. Sjálvandi vilja politikarar tæna borgarunum so væl sum gjørligt, men vit eru í einum tíðarskeiði, sum krevur umhugsni. Aðrastaðni hava tey stovnar, sum granska í framtíðini. Neyðugt er, at vit eisini kanna, hvørjar avleiðingar tær avgerðir, vit taka nú, fara at fáa í framtíðni. Vísa framskrivingarnar, at vit eru á skeivari leið, má kósin rættast," sigur Selmar Nielsen.

Ein átrokandi orsøk til at leggja verandi gongd undir luppin er, at nú er valár. Tá er ofta vandi fyri, at politikarar lora meira, enn ráðiligt er. Ein onnur er, at vit í framtíðini helst skulu liva í einum landi, sum vit eru errin av at hava bygt út á rættan og burðardyggan hátt.

"Tá fornfrøðingar settu spakarnar í Konganna Dal í Egyptalandi, gjørdust teir hugtiknir av, hvussu framkomnir gomlu egyptararnir høvdu verið. Enn standa eisini pyramidurnar sum vitnisburður um teirra dugnasemi. Fara fornfrøðingar at kanna okkara mentan um 500 ár, skulu teir helst eisini gerast hugtiknir av, hvussu væl vit dugdu at skipa fyri. Eftirtíðin skal kunna staðfesta, at her á landi búðu vís fólk," sigur Selmar Nielsen.



# Bústaðarneyð kann elva til lappaloysnir

**Tann góði bústaðurin er karmur um tað góða lívið, og tí er umráðandi, at bústaðir verða bygdir at fremja lívsgóðsku og styðja upp undir felagslív. Í løtuni verða fleiri óumhugsaðar loysnir framdar at nøkta ein bráðneyðugan bústaðartørv. Neyðugt er at hugsa meira um góðsku í bústaðarbygging, heldur Heidi Poulsen, arkitektur hjá MAP Arkitektum**



Stórur tørvur er á bústøðum, og tørvur er serliga á bústøðum, sum ikki eru so kostnaðarmiklir. Hetta hevur við sær trýst á politikarar um at nøkta tørvin sum skjótast, og í summum førum kemur fyri, at skjótar og bíligar bústaðarloysnir verða framdar, sum ikki eru væl umhugsaðar.

Tann leiðin er ikki nøkur gongd leið, heldur Heidi Poulsen, arkitektur hjá MAP Arkitektum. Skulu skundur og óumhugsni stýra bústaðarbyggingini, verður úrslitið í longdini ónøktandi fyri bæði fólk og samfelag.

"Í løtuni verður ov lítið hugsað um góðsku í bústaðarbygging, tí málið tykist at vera at byggja skjótt fyri at nøkta ein átrokandi tørv. Tvey dømi eru samansettu bingjurnar í Marknagili og byggingin á Karlamagnusarbreyt. Vit eiga at hugsa okkum betur um og gera av, hvussu vit byggja bústaðir á gagnligasta hátt, tí tann góði bústaðurin er karmur um tað góða lívið," sigur Heidi Poulsen.

## Vanta leigubústaðir

Størsti bústaðartørvurin er í høvuðsstaðnum. Tórshavnar kommuna hevur fyri stuttum gjørt eina frágreiðing um bústaðarpolitikk, sum m.a. vísir, at alt ov fáir leigubústaðir eru til taks. Frágreiðingin staðfestir eisini, at tey flestu vilja búgva í sethúsum, sum krevja meira pláss enn raðhús, tvíhús og íbúðarbygginar. Sethús eru tó kostnaðarmikil og hóska ikki neyðturviliga til dagsins tørv.

"Vit búgva munandi meira atskild í dag, enn vit gjørdu fyrr, og vist er ikki, at verandi bústaðarmynstur skundar undir tað góða lívið. Mong dragast við strongd, einsemi og vantandi lívsgóðsku, tí alt snýr seg um at arbeiða til tess at afturgjalda húsini. Vit eiga at byggja bústaðir, so fólk kunnu ogna sær bíligari bústaðir og kenna seg at vera meira í felagsskapi enn nú," sigur Heidi Poulsen.

Hon heldur, at Tórsbyrgi í Havn, sum varð bygt í 1976, var eitt tað mest framfýsna átakið, sum er framt í føroyskari bústaðarbygging. Har eru húsini samanbygd við fríøkjum, sum íbúgvarnir eru felags um, og bilarnir hava ikki atgongd millum húsini. Hetta skapar tættari samband millum íbúgvarnar, sum í felag taka sær av viðlíkahaldi og skipa fyri tiltøkum.

"Vit hugsa oftast individualistiskt í sambandi við bústaðarbygging og taka lítið atlit til felagsskapin. Hetta er neyvan nakar fyrimunur, tá vit kunnu staðfesta, at strongd, lívsstílssjúkur og einsemi eru millum okkara størstu avbjóðingar. Vit eiga at byggja soleiðis, at vit skunda undir tann góða felagsskapin, so trinvaðurin økist, og fólk kenna seg tryggari," sigur Heidi Poulsen.

## Sethús best umtókt

Síðan Bústaðir fóru at byggja leigubústaðir, eru stig tikin tann rætta vegin, heldur hon, og alt fleiri raðhús og tvíhús eru eisini bygd farnu 30-40 árini. Men framvegis eru nógv teir flestu bústaðirnir sethús. Sambært frágreiðingini hjá Tórshavnar kommunu eru 72 prosent av øllum bústøðum í kommununi sethús, 17 prosent raðhús og tvíhús, sjey prosent eigaraíbúðir, trý prosent lestrarbústaðir og bara eitt prosent leiguíbúðir.

Í sambandi við frágreiðingina spurdi Tórshavnar kommuna 500 fólk, hvat slag av bústaði tey vildu hava. Tey flestu svaraðu sethús. Fjórði hvør vildi tó búgva í leigubústaði, og millum teirra eru tey flestu ung undir 30 ár. Hetta er nógv, um samanborið verður við, at bara eitt prosent av øllum bústøðum í dag er leigubústaðir.

”Okkum tørvar eina visión um, hvussu bústaðarmynstrið skal vera. Vit hava eitt heilt annað samfelag nú enn fyri 40 árum síðan. Kvinnurnar arbeiða úti, børnini verða ansað í barnagørðum, og tey eldru eru á røktarheimi. Ættarliðini eru vorðin sundurskild, men allar kanningar vísa, at bestu lívsgóðskuna fáa vit við at vera saman við øðrum. Vit áttu at skundað undir felagsskapin í sambandi við bygging, so fjarstøðan ikki gerst so stór millum fólk,” sigur Heidi Poulsen.

Hon vísir á, at í øðrum londum verður nú tosað um at byggja bústaðir, sum hýsa fleiri ættarliðum. Hetta kundi givið foreldrum, børnum og ommum og abbum møguleika at búð tætt saman, men samstundis havt sítt egna. Hendan leiðin er eisini gongd fyri stakar uppihaldarar. Til ber at búgva tætt saman og eiga lutir í kostnaðarmiklum útbúnaði sum t.d. bilum, køksútbúnaði og amboðum, men kortini hava egið heim.

”Tá mong svara í kanningini hjá Tórshavnar kommunu, at tey vilja búgva í sethúsum, gera tey tað helst, tí tey kenna mestsum bara til sethús, og tí sethús tryggja privatlívið, gott pláss og góðar møguleikar til børn. Men alt hetta kann skapast í bústaðarbyggingum við góðum felagsøkjum. Nógv fleiri tílíkar bústaðarbyggingar eiga at verða framdar,” sigur Heidi Poulsen.







## Ung hugsa øðrvísi

Vanligt hevur verið, at familjur byggja sær sethús á 500 fermetrum við garði rundan, og at ein ella tveir bilar eru knýttir at húsarhaldinum. Í sethúsunum býr familjan so alt lívið og virkar fyri at gjalda íløguna aftur. Vist er tó ikki, at næsta ættarlið hugsar á sama hátt. Tey yngru eru meira flytfør, heldur Heidi Poulsen, og hetta má bústaðarpolitikkurin taka atlit til.

"Kanningin hjá Tórshavnar kommunu bendir á, at tey yngru stíla ikki altíð so høgt sum at ogna sær eini stór sethús. Tey hava tørv á innivisti, og tann tørvin kunnu leigubústaðir nøkta. Møguligt eigur eisini at vera hjá fólki at kunna flyta, tí ongin sigur, at øll allatíðina vilja búgva á sama stað," sigur hon.

Verandi politiska kjak um bústaðarneyðina er merkt av fjáltri, heldur hon, og vandi er tí fyri, at loysnirnar, ið koma á borðið, bara hava til endamáls at sløkkja eldar. Hendan gongdin kann koma samfelagnum aftur um brekku.

"Hvør tryggjar, at ein nýggj bústaðarbygging er gjøgnumhugsað, so hon tænir teimum, sum skulu búgva har? Í fleiri førum eydnast bústaðarbyggingar væl, men vit síggja eisini dømir, har heildin ikki er gjøgnumhugsað. Í sjálvum sær er ikki trupult at byggja bústaðir, men umhugsni krevst at byggja bústaðir rætt, so býlini, fríøkini og virksemið fáast at virka væl. Tá bústaðarbyggingar verða bodnar út, eiga atlit at verða tikin til hesi viðurskifti," sigur Heidi Poulsen.









# BÝRÁÐSHÚSIÐ ER BRÚGV MILLUM BYGDIR

**Tann 15. desember í 2017 varð fyrsti býráðsfundurin hildin í nýggja býráðshúsinum í Eysturkommunu. Húsið ímyndar samstarvsandan, ið hevur valdað millum Gøtu og Leirvík, síðan bygdirnar vórðu lagdar saman í Eysturkommunu í 2009. Ósbjørn Jacobsen Arkitektar hava teknað húsið. Í august 2018 vann tað 1. virðisløn á Global Architecture & Design Awards**



Tá hvirlurnar duna oman ígjøgnum Gøtudal tey myrku vetrarkvøldini, er best hjá fólki og fæi at halda seg innandurða. Men fjøllini mugu standa úti, og tað gera húsini eisini.

Eitt tað sjáldsamasta húsið í skotmálanum hjá hvirlunum er nýggja býráðshúsið í Norðragøtu. Í tí lýsa glæmur, sum skapa nærveru í vetrarmyrkrinum. Visti tú ikki betur, helt tú, at talan var um hulduheygg.

Býráðshúsið í Norðragøtu ger ikki stóran háva burtur úr sær sjálvum. Rísur hvørki upp ímóti himni ella reypar av maskuliniteti. Byggir bara brúgv yvir um Eiðisá og glíður stillisliga inn í náttúruvakra umhvørvið.

Súmbolikkurin kundi ikki verið betur valdur. Gøta og Leirvík tóku lógvatak saman sum Eysturkommuna í 2009, tí nú vildu bygdirnar samstarva heldur enn at virka í sjálvdrátti hvør sínu megin Knúk og Leirvíksfjall.

Aftrat samanleggingini skaptu eldsálir nýggja fótbóltsfelagið, Víking, ið hevur vunnið mangt eitt steypið í føroysku fótbóltskappingunum. Tann guli GÍ-liturin og tann grøni LÍF-liturin máttu lúta fyri tí ljósabláa Víkinga-litinum.

## Lítillátin bygningur

Ósbjørn Jacobsen býr sjálvur í Syðrugøtu, har hann hevur teknistovu. Hon er partur av Henning Larsen Architecs í Danmark, har Ósbjørn arbeiddi, áðrenn hann flutti heimaftur. Hjá Henning Larsens Architecs teknaði hann m.a. Hørpuna í Reykjavík.

Býráðshúsið hjá Eysturkommunu sæst ikki væl við fyrsta eygnabrá. Tú mást næstan gera tær ómak at síggja bygningin, kemur tú framvið í bili, og tað er eisini meiningin. Bygningurin skilir og virðir ta serligu náttúruna, ið umgirðir hann. Varisliga lagdur niður í landslagið tykist hann at flóta í sjálvari ánni.



Ósbjørn Jacobsen, arkitektur

”Mangar føroyskar verkætlanir kopiera beinleiðis tættir í siðbundnum føroyskum byggisniði. Eg haldi tað vera áhugaverdari at kava djúpri og kanna hugsanirnar handan siðbundna byggiháttin,” sigur Ósbjørn Jacobsen.

Ein týðandi táttur í føroyskum arkitekturi er kámaða markið millum náttúru og bygningar. Hesin byggiháttur ger tað trupult at skilja ímillum, hvar landslagið endar, og nær húsini byrja. Hendan grundhugsanin er brúkt í sambandi við býráðshúsini í Norðragøtu.

”Hetta kundi verið ein háttur at fingið íblástur til at ment byggilistarligt mál í Føroyum, so vit í framtíðini fara at byggja við heldur enn ímóti náttúruni,” sigur Ósbjørn Jacobsen.

## Best í 50 londum

Inni í húsinum heldur býráðsumsitingin til, og har er eisini býráðssalur. Borðið, sum býráðslimirnir sita við, er runt, so ongin sleppur reiðiliga at sita við endan. Eisini hetta ímyndar javnsetta samstarvsandan. Út ígjøgnum vindeyguni og niður ígjøgnum gólvið sæst niður í ánna og út á Gøtuvík.

Ljóð- og ljóslistaverkinum í húsinum hevur Jens L. Thomsen staðið fyri. Ljóð og ljós hava íblástur úr náttúruni og eru bygd inn í træveggirnar og glasfasaduna. Bygningurin talar tí eisini sítt egna stilla mál. Av tí, at býráðshúsið er brúgv um ánna, kanst tú ganga uppi á honum og sita á svalanum og hugna tær.

Býráðshúsið hevur longu vakt stóran ans uttanlands. Á Global Architecture & Design Awards í august í ár vann bygningurin 1. virðisløn. Hetta var ikki hissini viðurkenning, tí verkætlanin gjørdist tann besta í síni grein í kapping við 748 verkætlanir úr 50 londum.

“Sjálvandi kenst altíð væl at fáa viðurkenningar. Satt at siga visti eg ikki so nógv um hesa virðislønina annað enn, at dugnalig fakfólk sita í dómsnevndini, men hon er so við til at varpa ljós á Føroyar og føroyska byggilist. Vit eru ovfarin av áhuganum, men kanska ríður føroysk byggilist á somu bylgju sum okkara tónleikur og matmentan, har sjónligt er, at altjóða samfelagið vísir alsamt størri áhuga fyri fjarskotnum eindømum,” sigur Ósbjørn Jacobsen.







# Trygdarsamskipan altumráðandi á byggiplássum

**Nógvir vandar eru á einum byggiplássi, og stór krøv verða tí sett til trygdina, meðan arbeitt verður. Serútbúnu trygdarsamskipararnir hjá LBF, Bogi í Dali og Jón Nordendal, halda, at tilvitanin um heilsu-trygdar- og umhvørvisspurningar søguliga hevur ikki verið nóg stór, men nú gongur framá**



*Bogi í Dali og Jón Nordendal eru trygdarsamskiparar hjá LBF. Nógv atlit eru at taka til trygd, tá bygt verður, og hesar umhugsanir eiga at byrja longu í projekteringini, halda teir*




LYFTA
BWSC



Nógv bygging er í gongd í løtuni, og so leingi bygt verður, stendur mangt í hálvum gekki. Kranar tróna uppi yvir byggiplássum, koyrt verður áhaldandi aftur og fram á økjunum, vandamikil evnir verða brúkt, nógv verður sprongt, og á ólidnum tekjum eru hol, sum arbeiðsfólk kunnu detta niðurígjøgnum.

Ert tú óumhugsin í tílíkum umhvørvi, kann tað hava vanlukkuligar avleiðingar við sær, og neyðugt er tí, at tilvitanin um trygdina á byggiplássum allatíðina er stór. Byggiharrin hevur ábyrgd av trygdini á byggiplássinum, og stundum kemur fyri, at byggiharrar keypa sær trygdarsamskipan frá ráðgevandi fyritøkum, sum hava serútbúgvið fólk at taka sær av tí.

Hjá LBF starvast tveir tílíkir trygdarsamskiparar. Bogi í Dali er verkfrøðingur og Jón Nordendal byggifrøðingur. Teir hava báðir tikið eina serútbúgving í trygdarsamskipan. Í løtuni er Jón trygdarsamskipari í sambandi við útbyggingina hjá SEV á Sundi.

”Nógv atlit eru at taka, tá bygt verður, og hesar umhugsanir eiga at byrja longu í projekteringini. Tú kanst hava ætlanir um at byggja nógv og stórt, men ein og hvør byggiverkætlan skal vera byggibar. Byggir tú t.d. ein bygning, har trongt og óhøgligt er at arbeiða, økir tað um trygdarvandan hjá arbeiðsfólkinum, og tí má øll bygging umhugsast væl,” sigur Jón Nordendal.

## Lógir og kunngerðir

Løgtingslógin um arbeiðsumhvørvi ásetir, hvussu virkast skal fyri einum tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi. Hetta verður gjørt við vegleiðing frá Arbeiðseftirlitinum, sum eisini hevur eftirlit við, at alt fer rætt fram. Fleiri kunngerðir eru eisini lýstar um trygd, heilsu og umhvørvi. Tær skulu somuleiðis fylgjast.

Í kunngerðini um innrætting av byggiplássum er ásett, at tann, sum projekterar eitt byggi- ella anleggsarbeiði, skal taka atlit til trygd og heilsu og tryggja, at arbeiðsgongdirnar samsvara við arbeiðsumhvørvislógina. Ráðgevararnir skulu skrivliga vísa á, hvussu arbeiðið kann útinnast á so tryggan hátt sum gjørligt, og hvussu farast skal fram í sambandi við serliga vandamiklar støður.



”Alt økið kring heilsu, trygd og umhvørvi er neyvt reglerað við lógum og kunngerðum, so loyvt er ikki at slaka á økinum. Men trygdarspurningurin hevur søguliga ikki verið so høgt raðfestur í sambandi við projekteringina. Fyrimunirnir við beinanvegin at gera ætlanir fyri, hvussu arbeiðsgongdirnar skulu vera, eru stórir. Arbeiðið verður tryggari, og er alt gjøgnumhugsað, slepst undan, at kostnaðarmikil tiltøk skulu setast í verk, tá arbeiðið er farið gongd,” sigur Bogi í Dali.

Hann nevnir, at á einum byggiplássi kann vera nógv ferðsla í langa tíð. Er hugsað um, hvar parkeringsplássini skulu vera? Talan kann eisini vera um, at tungur útbúnaður skal flytast upp á ovastu hæddirnar. Eru trappurnar so smalar, at útbúnaðurin fæst ikki upp hagar? Er pláss fyri kranum á økinum, og er fjarstøðan til benið við nýggja bygningin nóg stór?

”Mangt er at hava í huga, tá lagt verður til rættis, og verður alt ikki havt í huga beinanvegin, skulu avbjóðingarnar loysast kortini, og tað kann dýrka verkætlanirnar nógv,” sigur hann.



## Broyttur hugburður

Varð trygdin ikki altíð so høgt raðfest fyrr, so er støðan batnað farnu 10 árini, halda Bogi í Dali og Jón Nordendal. Hetta sæst eisini millum arbeiðsfólk. Vanligt var t.d., at kom trygdarsamskiparin á staðið, gingu øll í hjálmi, tí nú var eftirlitið á vitjan. Aftaná varð aftur slakað upp á trygdina, og hjálmurin varð lagdur til viks.

”Vit síggja, at hugburðurin er broyttur. Arbeiðsfólk fylgja betur trygdarásetingunum, og tú sært t.d. ofta fólk ganga í hjálmi, hóast tey í arbeiðstøðuni ikki eru í vanda. Arbeiðsfólk eru meira tilvitað um, at trygdarparturin er ein sjálvsagdur partur av tí at útinna arbeiðið. Tann gongdin er gleðilig,” siga teir báðir.

Avbjóðingar eru tó framvegis, og ein avbjóðing kann vera mentanarmunir hjá arbeiðsfólkum. Alsamt fleiri útlendsk arbeiðsfólk arbeiða nú í Føroyum, og teirra mál er ofta at vinna nógvan pening í 3-4 ár og so fara heimaftur. Teirra ágrýtni er tí stórt, men skal skundur stýra avrikunum, kann trygdin koma í vanda.

”Vit síggja ávísar avbjóðingar við mentanarmunum, men her er so neyðugt at gera greitt, at trygdarásetingarnar galda fyri øll arbeiðsfólk, og at tær eru gjørdar teirra vegna. Trygdarsamskiparar hava reglulig eftirlit við, at alt fer rætt fram, og teir hava eisini heimild at steðga arbeiðum og koyra fólk til hús, fer alt ikki rætt fram,” siga Bogi í Dali og Jón Nordendal.

# GONGUR VÆL AT ÚTBYGGJA LANDSSJÚKRAHÚSIÐ



**Fyrst varð tann svarti G-bygningurin lagdur aftrat tí grøna B-bygninginum á Landssjúkrahúsinum, og nú er tann brúni H-bygningurin í gerð. H-bygningurin er 12.600 fermetrar til støddar og skal m.a. hýsa psykiatriska deplinum, medisinskum seingjarplássum, endurvenjing, føðideild og køki og matstovu. Heildarráðgevingin er føroysk, og arbeiðið hevur gingið væl**




*Full gongd er á at útbyggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum*

Føroysk sjúkrahússøga verður skrivað í løtuni í sambandi við, at Landssjúkrahúsið verður útbygt við 12.600 fermetrum. Frammanundan er tað útbygt við teimum 5.500 fermetrunum, sum tann svarti G-bygningurin umfatar. Hann stóð liðugur í 2004. Landssjúkrahúsið er tí nærum ikki at kenna aftur samanborið við uppruna-ligu byggingina, sum byrjaði í 1963.

Nýggjasti sjúkrahúsbygningurin er staðsettur millum verandi bygningar og sjóvarmálan. Sunnanfyri H-bygningin er tyrlupallur og norðanfyri neystini hjá Havnar Róðrarfelag. Tá bygningurin er liðugur, verður verandi inngongd til Landssjúkrahúsið framvegis nýtt sum høvuðsatkoma, og haðani ganga fólk ígjøgnum ein íbindingarstrong inn í H-bygningin.

Í H-bygninginum verður alt virksemið hjá psykiatriska deplinum, medisinskar seingjarstovur, føðistovur og isolatiónsstovur. Pláss verður eisini til endurvenjing, ráðstevnuvirksemi, matstovu og køk,



parkering, goymslu, vask og tøkniligar funktiónir. Seingjarstovurnar eru einastovur og hava pláss til avvarðandi at gista. Tær hava eisini egið baðirúm.

Einastovurnar fara at hava við sær, at samrøður, røkt og viðgerð kunnu vera undir virðiligum umstøðum. Í einastovum er smittuvandin minni, og óætlaðu óhappini eru færri. Náttarsvøvnurin er eisini betri, og møguleikin hjá sjúklingi og avvarðandi at samskifta er betri. Endamálið við einastovunum er tí fyrst og fremst at økja um sjúklingatrygdina.

Við H-bygninginum verður dentur lagdur á at skapa eitt so heimligt og hugnaligt umhvørvi sum gjørligt og at gagnnýta staðsetingina við sjóvarmálan og Sandágerði. Ætlandi verður bygningurin liðugur í februar 2021. Higartil hevur arbeiðið verið fleiri vikur framman fyri tíðarætlanina, og óvæntaðar avbjóðingar hava ikki verið í sambandi við byggingina.

Føroyska ráðgevarasamtakið, Faerport II, hevur staðið fyri heildarráðgevingini. Í Faerport II eru SNA Árni Winther Arkitektar, LBF, KJ Elráð og SMJ ráðgevandi verkfrøðingar. Byggiharri er Landsverk, og arbeiðsánari er Heilsu- og innlendismálaráðið. Byggingin verður rindað á samlaðu árligu játtanina til Landssjúkrahúsið.




MTHøjgaard
MTHøjgaard



## STUTT UM H-BYGNINGIN

**- 2. hædd:**
Goymsla, parkeringskjallari og tøkni

**- 1. hædd:**
Psykiatriskur depil og køkur við matstovu

**0. hædd:**
Dagtilboð og endurvenjing

**1. hædd:**
Seingjarstovur og isolatiónsstovur

**2. hædd:**
Seingjarstovur og føðideild

**3. deild:**
Tøkni og ventilatión





# SJÚKRAHÚS SØGULIGA

Fyrsta føroyska sjúkrahúsið var Argjahospital, sum hýsti spitølskum sjúklingum. Tað var ið hvussu er virkið í 1547 og varð selt á uppboði í Saksun í 1828. Síðan komu sjúkrahúsini í hesi røð:

**1829** Færø Amts Hospital

**1898** Klaksvíkar sjúkrahús

**1904** Suðuroyar sjúkrahús

**1924** Dronning Alexandrines Hospital

**1963** Landssjúkrahúsið

**2004** G-bygningurin liðugur

**2021** H-bygningurin liðugur



# Nú koma hotellini

**Ferðavinnan er í vøkstri, og í løtuni verða fleiri hotell bygd at nøkta tann alsamt vaksandi tørvin á gistingarmøguleikum. Smyril byggir hotell við R.C. Effersøesgøtu í Havn við 124 kømurum, og Atlantic Airways og LÍV byggja nýtt hotell á Staravegnum við 130 kømurum. Føroyskar fyritøkur eru ráðgevarar**





*Hotellið hjá Smyril Line við R.C. Effersøesgøtu í Havn fer at síggja soleiðis út*

Visit Faroe Islands hevur seinnu árini lagt stóran dent á at menna ferðavinnuna, so ferðavinnan kann gerast uppaftur størri inntøkukelda hjá samfelagnum. Kunnleikin til Føroyar er nógv vaksin av átakinum, og ferðafólkatalið økist eisini.

Trýst hevur leingi verið á hotell og gistingarhús í háárstíðini, men hetta trýstið fer at linka, nú fleiri nýggj hotell verða bygd. Tvey teirra eru hotellini, sum Smyril Line og Atlantic Airways eru farin at byggja í Havn.

Spakarnir eru longu settir í svørðin við R. C. Effersøesgøtu og Staravegin, og bæði hotellini væntast at vera liðug 2. ársfjórðing í 2020. Smyril Line rekur frammanundan Hotel Hafnia, meðan leikluturin hjá Atlantic Airways í hotellvinnuni er nýggjur.

## Hotellið hjá Smyril Line

Hotellið hjá Smyril Line er staðsett niðan fyri Oknarveg. Atkoman verður haðani, og koyrandi verður runt um bygningin. Tilsamans 124 parkeringspláss verða gjørd kring bygningin samsvarandi talinum á kømurum. Høvuðsframsíðan er út ímóti R. C. Effersøesgøtu og Gundadali.



Grundstykkið er umleið tvífalt so langt, sum tað er breitt. Stykkið er eitt sindur bratt suðureftir, og tí verða gjørdir skráar, stuðulsveggir úr betongi og grótlaðing út ímóti R. C. Effersøesgøtu. Byggingin verður S-formað, og flag verður á tekjuni.

Í norðraru lonini verður bygningurin tríggjar hæddir, og miðskeiðis hækkar bygningurin, so syðra lonin verður fýra hæddir. Eyka hæddin her verður brúkt til køk, goymslur o.a. Í teirri syðru lonini verða 63 kømur og teirri norðraru 61.

Miðskeiðis í bygninginum verða felagsøkini býtt út á fýra hæddir. Í niðastu hæddini verða morgunmatur og tænasturúm. Á 2. hædd verða móttøka og onnur rúm og á 3. og 4. hædd tey stóru fundarhølini.

Byggingin er burturav eitt betongbyggjarí við fasadu úr timbri. Tilfarið innan er teppir, betong, flísar, grót og timbur. Ætlanin er at velja føroyskt tilfar, so bygningurin samsvarar við staðið, hann verður settur á.

Byggitilfarið verður betong, stál og timbur. Betong verður brúkt til veggir, súlur og dekk, meðan stál verður brúkt til bjálkar, sum fara at bera betongdekkini og tekjuna yvir miðøkinum. Tilsamans verður bygningurin 4.735 fermetrar.

## Hesir gera hotellið:

- Articon, arbeiðstakari
- Kontrast, arkitektaráðgeving
- SPENN, berandi verkfrøði
- PBC Consult, HVS-verkfrøði
- SMJ, el-verkfrøði og brunaráðgeving



*Hotellið hjá Atlantic Airways og LÍV við Staravegin*



## Hotellið hjá Atlantic Airways

Á hotellinum hjá Atlantic Airways og LÍV við Staravegin verða 130 kømur, harav átta eru til rørslutarnað. Bygningurin er staðsettur niðan fyri Staravegin við at-komu úr erva. Koyrandi er runt um bygn-ingin við stórum bilum, m.a. bussum og brandbilum.

Høvuðsframsíðan er út ímóti Eystara Ringvegi. Parkeringsplássini verða 130 í tali, og pláss verður eisini til súkklur á parkeringsøkinum. Grundstykkið er umleið tvífalt so langt, sum tað er breitt. Flag verður lagt á tekjuna.

Byggingin er sniðgivin soleiðis, at báðir endarnir samsvara við hæddina á granna-byggingini. Har bygningurin verður hægst, verður hann ájavnur við bygningin, sum Dimmalætting bygdi. Bygningurin er tí fimm hæddir, har hann er hægstur, og tvær hæddir, har hann er lægstur.

Talan er um betongbygging, og fasadan verður úr aluglasi. Byggitilfarið er betong,




*Soleiðis fer hotellið hjá Atlantic Airways og LÍV niðan fyri Staravegin at síggja út*



*Hotellið hjá Smyril Line sæð av Oknarvegi*



stál og timbur. Betong verður brúkt til veggir, súlur og dekk, meðan stál verður brúkt til bjálkar, sum skulu bera betongdekkini og tekjuna yvir miðøkinum.

Úr bygninginum fer at kunna síggjast út á sjógv og Eystnes. Eisini sæst oman í Hoydalar og yvir á sermerkta økið við Svartafoss.

Hotellið hjá Atlantic Airways og LÍV verður bygt í samstarvi við Hilton. Hetta fer at eyðkenna innrættingina, m.a. við øllum felagsøkinum á niðastu hæddunum og kømurunum á ovaru hæddunum. Tilsamans verður bygningurin 6.374 fermetrar.

## Hesir gera hotellið:

- Húsavarðatænastan, arbeiðstakari
- Kontrast, høvuðs- og arkitektaráðgeving
- LBF, berandi verkfrøði og el-verkfrøði
- PBC Consult, HVS verkfrøði
- HMP Consult, brunaráðgeving



# Mest at gera fyri kommunurnar

**Umsetningurin hjá ráðgevaravinnuni var 147 mió. kr. í 2017 samanborið við 144 mió. kr. í 2016. Meira enn helmingurin av tænastunum varð latin kommununum, 57 prosent. Parturin hjá tí almenna var 21 prosent, og tann hjá tí privata var 19 prosent**

Ráðgevarafelagið spyr hvørt ár limafyritøkurnar í felagnum, hvussu stórt teirra virksemi hevur verið undanfarna ár. Endamálið er at fáa til vega vitan um gongdina í vinnuni.

Í fjør vísti uppgerðin, at framgongdin í vinnuni var stór. Umsetningurin vaks úr 122 mió. kr. í 2015 upp í 144 mió. kr. í 2016. Í 2017 var umsetningurin 147 mió. kr. Sostatt er hann nærum óbroyttur.

Í fjør svaraðu 81 prosent av fyritøkunum spurnarblaðnum hjá Ráðgevarafelagnum. Í ár var talið 77 prosent, og tí geva tølini ivaleyst eina rættvísandi mynd.



## Kundasamanseting í prosentum - 2017




## Kundasamanseting í prosentum - 2016




## Kundasamanseting í prosentum - 2011




Ráðgevarafyritøkur veita bæði landi, kommunum og privatum fyritøkum tænastur. Tann kommunali parturin hevur øll árini síðan 2011 verið størstur, og tað var hann eisini í 2017 – 57 prosent. Hendan økingin er stór samanborið við 2016, tá tann kommunali parturin var 44 prosent.

Kommunurnar keyptu tænastur fyri 84 mió. kr. frá ráðgevaravinuni í 2017. Landið keypti fyri 31 mió. kr. ella 21 prosent og tað privata fyri 28 mió. kr. ella 19 prosent.

Uppgerðin hjá Ráðgevarafelagnum vísir eisini, at 68 prosent av arbeiðunum í 2017 vórðu framd í sambandi við bygningar, 26 prosent í sambandi við anlegg og 4 prosent í sambandi við planlegging. Hetta var nærum tað sama sum í 2016.



> “THIS PAST HALF CENTURY, THE CONSULTANCY INDUSTRY IN THE FAROE ISLANDS HAS PROVEN THAT IT CAN MANAGE ALL KINDS OF PROJECTS

# The Faroe Islands can be Self-Sufficient with Consultancy Services

**The Faroe Islands are home to 26 architectural firms, engineering firms and construction companies, all employing some 120 people. The Faroe Islands have all that is needed to be full self-sufficient regarding consultancy services, says Selmar Nielsen, chairman of the Association of Consulting Architects and Engineers**

The Faroese consultancy firms founded the Association of Consulting Architects and Engineers in 2008, because they felt that they were not given equal opportunities with foreign firm to participate in projects. These last years, Selmar Nielsen has been chairman of the association.

"This past half century, the consultancy industry in the Faroe Islands has proven that it can manage all kinds of projects. We call attention to this fact whenever necessary, so that the clients are always aware of this truth," says Selmar Nielsen.

He points to the fact that there are companies in the Faroe Islands that have projected and designed tunnels, harbours, power plants, terminals, hospitals, nursing homes, production buildings, schools and many other things. The Faroese consultancy industry has all the skills and knowledge needed to build in the Faroe Islands.

"Faroese consultants know the Faroese circumstances better than anyone else. Having the knowledge and expertise about the circumstances here is an advantage, and the experience that these firms have gathered have developed the industry and made it what it is today," he says.

However, the Faroese consultancy firms do not only operate on the Faroe Islands. Their ambitions have also taken them abroad. Some of them have performed tasks in Greenland, e.g. on the American Thule-base. SNA is in charge of projecting an American solar engineering plant in Iceland, which MT Højgaard is building.

"As an industry, we have greater ambition than just being contractors in other firms' big projects. The Faroese consultancy industry is an industry based on knowledge and which has professional pride. We want to encourage young people to move back to the Faroe Islands and we will give them exciting tasks to perform," says Selmar Nielsen.



## Hesir limir eru í Ráðgevarafelagnum

- Arkitektar 99
- Brim Arkitektar
- Byggitrygd
- EM Ráðgeving
- EYA arkitektur Design
- Fuglø Arkitektar
- HMP Consult, ráðg. verkfrøðingar
- Kontrast
- LBF
- Lon - Byggifrøðilig ráðgeving
- MAP Arkitektar
- Martin E. Leo
- MP-Tek
- Ósbjørn Jacobsen Arkitektar
- Ove Mortensen Arkitektavirkið
- PB - Consult
- Preben Hansen, ráðg. verkf.
- Ráð
- Sámal Johannesen
- SMJ Ráðgevandi verkfrøðingar
- SNA Árni Winther Arkitektar
- Spenn
- Steingrund Akustik
- Teknistovan v/Eyðun Petersen
- Zeta Architects

RÁÐGEVARAFELAGIÐ